

www.oljan.fo

**Jan Müller** 07 - 09 - 2011

# Íløgur fyri nógvar milliardir í Norðsjónum

Tey næstu árini fara oljufeløgini at gera stórar íløgur í tí danska partinum av Norðsjónum Áhugin fyri at leita eftir olju og gassi í danska partinum av Norðsjónum er vaksin nógv í seinastuni, og Energistyrelsen væntar, at oljufeløgini fara at gera íløgur fyri knappar 40 milliardir krónur í økinum tey næstu trý-fýra árini. Jan Harley Andersen, verkfrøðingur hjá Energistyrelsen, sigur við blaðið Ingeniøren, at oljufeløgini eru sera bjartskygd, tá tað snýr seg um tær donsku oljuleiðirnar. Hann roknar við, at í ár brúka feløgini knappar 5,2 milliardir krónur til at menna tær donsku leiðirnar, og at íløgurnar fara at veksa 50 prosent til 2013. Síðani verður eitt minni fall í íløgunum, men í 2015 fara feløgini aftur at brúka 15 milliardir krónur, tí tá fer framleiðslan á Hejre-leiðini í gongd. Dong, sum er operatørur á Hejre-leiðini, hevur gjørt av at brúka níggju milliardir krónur í donskum øki tey næstu árini. Einki annað felag ger so stórar íløgur í donskum øki sum Dong, skrivar Ingeniøren.